## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Mong heilsaðu Amariel á 60 ára degnum

NØVN Í VIKUNI
*Jan Müller*
*Jan@sosialurin.fo*

Tað kendist sum at koma til eina listaframsýning, tá opið hús var í heiminum hjá listamanninum Amariel Norðoy í Lambagerði 1 í Havn leygardagin, nú hann fylti 60 ár. Næstan tapetiseraðir veggir við vøkrum og fjølbroyttum málningum eftir ymsar føroyskar listamálarar skaptu hesa kenslu um somu tíð sum tú var komin fyri at heilsa uppá henda blíða og heita listamannin á 60 ára degnum. Nógv fólk stukku inn á gólvið í sjáldsama góðveðrinum leygardagin, og blíðskapurin var stórur. Forvitn-isligt var hjá gestunum at vitja nýggja atelierið hjá Amariel, sum nýliga er fluttur og hevur fingið góðar arbeiðsumstøður. Myndirnar eru frá móttøkuni í nýggja heiminum hjá Amariel og Marionnu.



*Amariel og Marianna saman við soninum og abbasoninum*



*Heimið minnir ikki sørt um eitt listasavn*



*Høvdingar hittast. Zacharias Heinesen og Amariel Norðoy*



*Nógv kend andlit vitjaðu. Her klædnakongurin úr Vági*



*Eli og Amariel her saman við Frimod*



*Astrid gleddi listafelagan við turkaðum springarakjøti og grønmeti*



*Knút og Sólrun heilsaðu føðingardagsbarninum*